## Vilja hava Torres til Manchester

Millum mongu stjørnurnar, sum Manchester City sigst vera til reiðar at keypa, er eisini Fernando Torres hjá Liverpool. Á Anfield siga tey seg tó ikki hava áhuga í at selja spælaran, og sambært umboðsmanni hansara, Jose Antonio Martini, ætlar spælarin sær heldur ikki nakran veg sjálvur. – Stórfeløgini sýna øll áhuga fyri Torres, men honum dámar væl í Liverpool, og hann gleðir seg bara, til hann aftur er til reiðar at spæla, sigur Martini. Torres hevur higar til skotið 38 mál í 62 dystum fyri Liverpool.



## Sleppur ikki Ronaldo

Hóast avrikini ikki hava verið heilt so framúr, sum tey vóru seinasta kappingarár, so tykist Real Madrid framvegis at hava sama áhuga í Cristiano Ronaldo. Seinastu tíðina hevur eisini ljóðað, at Manchester United og Real Madrid hava gjørt eina avtalu, men hesum vísir Sir Alex Fergusoni harðliga aftur. – Halda tit, at eg vildi gjørt eina avtalu við hatta felagið. Eg hevði ikki somikið sum vilja selt teimum ein virus, segði Sir Alex við ensku miðlarnar, eftir at Ronaldo hósdagin hevði skotið eitt av málunum í 5-3 sigrinum hjá Manchester United móti Gamba Osaka.

# Fótbóltstilvera í føðibýi H.C. Andersens

**Mong ævintýr eru skrivað í Odense. Tvey ung føroysk fótbóltstalent royna at skriva sítt egna fótbóltsævintýr. Fyens Stiftstidende hevur tosað við Viljorm Davidsen og Teit Gestsson**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*
*(Fyens Stiftstidende 9. desember 2008)*


*Føroysku unglingarnir trívast væl í Odense, har teir eru í ferð við at skriva sítt egna fótbóltsævintýr*

Fyri ávikavist hálvum og hálvumøðrum ári síðani fluttu Viljormur Davidsen og Teitur Gestsson saman við familjum sínum úr Føroyum, og til Danmarkar. Tað eru rættiliga nógvar føroyskar familjur, sum flyta til Danmarkar, men orsøkin til, at júst hesar báðar familjurnar fluttu til Danmarkar, er øðrvísi, enn hjá flestu øðrum familjum, sum flyta til Danmarkar. Familjurnar eru nevnliga fluttar til Odense, fyri at stuðla ungu synum sínum við dreyminum um at fáa eina fulltíðar yrkisleið, sum fótbóltsspælarar.

### Ikki somu møguleikar í Føroyum

Viljormur er ikki í iva um eyðsýnda munin millum Danmark og Føroyar á hesum øki - Tað er ikki talan um somu møguleikarnar í Føroyum, um ein ynskir at liva av at spæla fótbólt. Sum føroyskur fótbóltsspælari, er ein noyddur at fara uttanlands, um ein veruliga vil menna seg. Talentarbeiðið er bara betri í Danmark, greiðir tann 17 ára gamli Viljormur Davidsen frá. Floksfelagarnir og liðfelagarnir nevna Viljorm "William", tí hesir hava (dønum líkt red.) stórar trupulleikar við at siga: "Viljormur". Viljormur er verjuspælari á U-19 talentliðnum hjá OB. Viljormur gongur eisini í studentaskúla.

### Royndarvant í fleiri feløgum

Teitur Gestsson er 16 ára gamal, og er hann málverji á U-17 liðnum hjá OB. Teitur fór eisini til Danmarkar við sama endamáli, sum Viljormur. Nevnliga at menna talentið, og tað vóru fleiri donsk feløg, sum sóu stórar framtíðarmøguleikar í tí unga, føroyska málverjanum. – Eg varð og royndarvandi í Brøndby, FC Midtjylland og OB. Brøndby og OB bjóðaðu mær eitt pláss á liðnum, men eg valdi OB, tí eg kendi meg meiri vælkomnan í felagnum her, greiðir Teitur frá.

Teitur gongur í 10. flokki, og býr hann í Odense sman við pápa sínum, mammu sínari og systur sínari. Tey trívast øll væl í Odense, men viðhvørt leingist Teitur aftur til Klaksvíkar. – Eg sakni sjálvsagt familjuna og vinirnar heima, og tað er ótrúliga gott, tá ein av og á fer heim til Føroya at vitja. Eg gleði meg ótrúliga nógv til at halda jól saman við familjuni heima í Klaksvík.

Viljormur hevur eisini gott samband við vinirnar heima. Teir stuðla eisini Viljormi í royndum hansara at gerast yrkisspælari. – Teir halda, at tað er feitt, at eg eri farin til Danmarkar at spæla fótbólt. Eg havi samband við teir gjøgnum Skype og Messenger á teldūni. Tíðum spyrja teir til stuttleikar, um teir kunnu fáa VIP-atgongumerki til heimadystirnir hjá OB, sigur Viljormur smílandi.

### Vilja spæla í Superliguni

Málið er greitt hjá báðum teimum føroysku unglingunum. Teir ynska at spæla í Superliguni. – Tað er jú tí, at vit eru her. Tað er tann sjálvsagdi dreymurin, at eg gerist nóg góður til at spæla í Superliguni, og seinni nóg góður til at spæla við einum stórum felagi uttanfyri Danmark, undirstrikar Teitur.

Teitur og Viljormur fylgdu væl við Superliguni heima í Føroyum, har tað ber til at síggja tær donsku sjónvarpsrásirnar. Upprunaliga varð tað ikki OB, men FC Keypmannahavn, sum varð yndisliði hjá Teitir, men høvuðsorsøkin til hetta varð, at býarfelagin, Todi Jónsson spældi við FCK. Viljormur og Teitur eru vorðnir góðir vinmenn, og teir eru ofta saman í tí sindri av frítíð teir hava, tá teir ikki venja, ella ganga í skúla. – Tað er gott at kunna samskifta á føroyskum saman við einum øðrum. Annars hevði verið vandi fyri, at føroyska málið fór í gloymskuna.

Viljormur og Teitur halda, at um nakar avgerandi munur er millum Danmark og Føroyar, so er tað veðurlagið. – Tað er rættiliga stuttligt, at danskt sjónvarp hevur innsløg, tá tað regnar ella kavar illa her. Tí um ein vil síggja nógvan kava ella regn, so skal ein bara fara ein túr til Føroyar, siga báðir flennandi.

Báðir høvdu trupuleikar við at spæla fótbólt í teimum heitu, donsku summarmánaðunum. Heima í Føroyum er tað sjáldan, at hitalagið fer upp um tey 15 stigini. Orsaka av veðurlagnum, so eru næstan allir vøllirnir í Føroyum gjørdir av graslíki. Tað er nærum ógjørligt at røkta ein grasvøll, orsaka av føroyska veðurlagnum, greiða teir frá.

### Hart arbeiðið

Føroysku unglingarnir eru fegnir um tilveruna í Odense. Teir hava fingið nakrar góðar liðfelagar í felagnum, og nakrar góðar skúlafelagar eisini. Men teir hava trupuleikar við at røkka øllum, sum er á skránni, tí teir brúka so nógva tíð uppá fótbóltin, aftaná skúlatíð. – Vit venja mánadagar, týsdagar, tvær ferðir hósdagar, og so spæla vit dyst leygardagar. Harumframt renni eg, og geri styrkisvenjingar, greiðir Viljormur frá.

- Eg venji enn meiri enn hann, leggur Teitur aftrat. – Eg havi eisini málmansvenjingar, og tað er nakrar ferðir eyka um vikuna. Men tey ungu føroyska fótbóltstalentini grenja ikki. Teir hava valt at satsa uppá OB og ítróttina, og talentið røktar seg ikki sjálvt.

## Vilja halda jól í oddinum

**Síðani týskvøldið hevur Stjørnan verið á odda í Sunset-kappingini, men hetta kann VB broyta leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar er tað vorðið alt meira sjónligt, at oddastríðið í kvinnuhondbólti í ár stendur millum Stjørnuna og VB.

Seinasta vikuskiftið vórðu Tjaldur og Neistin mest sum sett av í kappingini um finalusessirnar, og nú kann VB so økja enn meira um fjarstøðuna til triðja plássið.

VB vitjar nevnliga hjá Tjaldri leygardagin, og hóast Tjaldur hevur bitið væl frá sær í fleiri dystum, so geva seinastu úrslitini eina fatan av, at VB eru favorittar til dystin.

Seinni dysturin hetta vikuskiftið er í Havn, har Neistin tekur móti StÍF. Havnarkvinnurnar hava enn ein lítlan møguleika at røkka finalusessinum, og tað er so hesum, sum tær spæla fyri. Og móti StÍF eru tær greiðir favorittar.

Triði dysturin hetta umfarið varð avgreiddu longu týskvøldið. Tá vann Stjørnan í Havn móti Kyndli, og eru klaksvíkarkvinnurnar við hesum á odda í deildini. Í øllum førum fram til leygardagin.